# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 19. august 2009




Erling Fles úr Klaksvík og Henry Petersen úr Fuglafirði fyrireika seg her til venjingardyst tíðliga í ár, men skulu í kvøld gera seg klárar til stórdyst, tá ÍF Føroyar á Gladsaxe Stadion spælir steypadyst ímóti 1. deildarfelagnum AB

Mynd: Rólant Waag Dam

# Størsti dystur nakrantíð

**Føroyska útisetafelagið í Keypmannahavn, ÍF Føroyar, stendur í kvøld framman fyri síni størstu ítróttarligu avbjóðing nakrantíð, tá steypadystur skal spælast á Gladsaxe Stadion ímóti AB, ið annars spælir í næstbestu donsku deildini**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Í kvøld klokkan 17.30, føroyska tíð, skal besta mansliðið hjá ÍF Føroyum spæla dyst í donsku steypakappingini ímóti 1. deildarfelagnum, AB, sum millum annað hevur havt Christian Høgna Jacobsen í spælarahópinum til fyri kortum, tá hann flutti heimaftur til NSÍ.

Hóast ÍF Føroyar á pappírinum stendur at hava heimavøll, er dysturin fluttur til heimavøllin hjá AB, Gladsaxe Stadion, ið hevur sera góðar umstøður og pláss fyri nógvum áskoðarum.

– Vit valdu at spæla dystin har, fyri at fáa upplivingina, tí tað er eitt stórt stadion, ið tekur um 10.000 fólk, sigur Sigmund Mikkelsen, sum er venjari hjá føroysku monnunum, ið róliga kunnu sigast at vera tað liðið, øll vænta, at AB fer at vinna lættliga á.

– Tó vil eg siga, at vónirnar eru so góðar, sum tær kunnu verða. Liðið hjá okkum er so sterkt sum møguligt, men vit mugu helst rokna við, at tað eru vit, sum eru »underdog« í hesum dystinum. Men vit taka tað sum eina uppliving, og tað skal nokk verða stuttligt.

## Undirmeting

Ávegis til henda dystin í Ekstra Bladet Cup, sum danska steypakappingin eitur, hevur ÍF Føroyar sera sannførandi vunnið tríggjar dystir, sum hava verið ímóti KFUM, Union og Fix. Hinvegin gekk ikki so væl í fyrsta dystinum í nýggja kappingarárinum í Seriu 1, sum var leygardagin ímóti Østerbro, ið vann heili 6-0.

Tað var nú kanska ikki so heilt galið allíkavæl, tí líkt er til, at tað úrslitið hevur gjørt, at teir í AB ikki vænta sær ta stóru mótstøðuna frá ÍF Føroyum. AB-heimasíðan ger nógv burturúr, at flestu av føroysku spælarunum eru heima í summarfrí, og at talan tí er um eitt lið, sum ikki heilt er í toppformi.

AB mynstrar verri enn so við síni sterkastu manning, og tað kundi kanska bent á eina undirmeting. Tveir U19-landsliðsspælarar eru ikki við, tí teir eru farnir til Ungarn við landsliðnum, og harumframt verða fleiri spælarar spardir til aðrar dystir, har AB heldur, at meira brúk verður fyri teimum. Og sum byrjunaruppstillingin hjá AB sær út, fara tríggir av teirra spælarum at spæla sín fyrsta dyst á besta liðnum hjá AB í kvøld.

## Góða hjálp

Hóast summarfrítíðin kann hava tikið eitt sindur, so er føroyska liðið tó ikki púra »fyri nothing«, tí við góðari hjálp frá stuðlum og øðrum góðum fólki, er eydnast at fáa spælarar úr Føroyum til Danmarkar í ótíð. Eitt nú hevur Atlantsflog verið lagaligt, og tí vænta tey í ÍF Føroyum, at tað altso verður við sterkastu manning, at farið verður á vøllin á Gladsaxe Stadion í kvøld.

– Millum teirra, vit fáa niður til dystin, eru Erling Fles, Ove Brim, Jákup Olsen, Emil Leifsson Nolsøe, Johan Gunnarsson og Heini Kristiansen, sum hava verið í gongd og spælt, meðan teir hava verið heima, sigur Sigmund Mikkelsen, sum í gjárkvøldið hevði allar spælararnar savnaðar til eina lætta venjing.

– Og hóast allir ikki eru í toppformi, eru spælararnir øgiliga spentir til uppgávuna. Vit kunnu bara yvirraska, tí vit hava einki at tapa, men alt at vinna.

Vinnarin av dystinum á Gladsaxe Stadion í kvøld skal í næsta umfarinum spæla ímóti Søllerød Vedbæk. Vinnur AB, skal liðið á útivøll, men vinnur ÍF Føroyar, verður tann dysturin spældur á vanliga heimavøllinum, Kløvermarken.